# Okkara kokkar - Sending nr. 4

Gudmundur og Joen PeterKulottusteik við whiskysós og eplarullu Kaffidessert



**Kjøt og sós**

**Hetta skalt tú brúka:**

1 kulottusteik uppá uml. 3. kg
1 leyk
200 gr. av soppum
1 l. av neytasoði
2 dl. av whisky

**Soleiðis gert tú:**

Steik kjøtið í 2-3 x 20 min við steðgum uppá 15 min.

**Sós:**

1. Sker leyk og soppar í tunnar flísar og steik í grýtu, inntil alt er ljósabrúnt
2. Stoyt whisky í og lat kóka
3. Stoyt neytasoð í, fá uppá kók og ger útá við maisena.

**Eplir:**

6 stór eplir
1 reyðan leyk
3 várleykir
100 gr. av soppum.

**Soleiðis gert tú:**

Rív eplir niður á eina plátu við bakipappíri
Sker leyk, soppar og várleyk smátt og koyr á eplini
Píska 4 egg saman og stoyt tey á eplini
Set plátuna í ovnin í uml. 15. min.
Tak plátuna út , rulla sum eina rullukøku og set inn aftur í ovnin í 15. min.
Sker eplini í flísar og borðreið beinanvegin.

**Kaffidessert**
**Hetta skalt tú brúka:**
6 bløð av husblas
3 egg
75 gr. av sukri
125 gr. av sjokulátu
1 dl. av sterkum kaffi
4 dl. av róma

**Soleiðis gert tú:**Set husblas í kalt vatn í uml. 5 min.
Píska egg og sukur til alt er skúmandi
Rív sjokulátuna niður í husblasið
Stoyt kaffi í og rør væl saman
Koyr síðani pískaðu eggini í
Píska róman og koyr hann í til seinast.
Dessertin kann pyntast við alskyns fruktum og róma.

Viðmerking:

# Fullveldi, stoltleiki og ábyrgd

Eg trúgvi at tað eru mangir Føroyingar sum eru ikki sørt ørkymlaðir av prátinum um fullveldi ella ikki fullveldi. Hvat merkir orðið og hvønn týdning kemur tað at hava fyri hvønn einstakan av okkum?

Hesin spurningurin er ógvuliga trupul, og hvat rætta svarið er, veit ongin.

Nú er tað upp til politikkarnar í samráðingum við donsku stjórnina, at fáa okkara fólk at trúgva uppá, hvat er tað besta fyri okkum, sum búleikast her á klettunum.

Vit eru øll, tá tað kemur til stykkið, ógvuliga góð við hesar oyggjar, sum hava givið okkum so nógv.

**Skulu liva saman**
Eg ætli mær ikki í hesari grein at leggja eftir hvørki Tjóveldisfólki ella Sambandsfólki, men bara minna á, at líkamikið hvat úrslitið av samráðinginum verður, so skulu vit øll liva saman á hesum klettum, eisini aftan á eina fólkaatkvøðu.

Eg havi eina ógvuliga greiða støðu hesum viðvíkjandi.

Í Føroyum skulu vit Føroyingar hava so nógv sjálvstýri sum til ber. Eg haldi ikki og vóni ikki, at tað eru Føroyingar sum siga, at vit ikki skulu hava sjálvstýri í Føroyum.

Eg havi eina greiða meining um tað at hava ein stoltleika, bæði sum eitt einkult menniskja og sum ein heil tjóð. Tann stoltleikin tú sjálvur eigur,ella merkir at tú eigur, kann ongin taka frá tær, hvørki ein politisk skipan, ella ein ørvísi meining, enn tín egna. Tú skapar tín egna stoltleika, innan í tær sjálvum.

Eg trúgvi ikki uppá nakra ávísa politiska skipan, sum ta einastu røttu, men eg trúgvi uppá menniskjini í skipanini.

Ongari skipan er lív lagað, hvar tað eru menniskjur, sum ikki hava rygg, moral ella karakter til at tora at siga, at tey til tíðir ikki strekkja til, ella taka skeivar avgerðir.

Eg havi eina greiða meining um, at vit í felagsskapi við annað land, ella onnur lond, geva okkara fólki, bestu kor at liva undir.

Tøl eru ikki gandakynstur Tað sum eg havi lært um tøl higartil í lívinum sigur mær, at um tildømis inntøkan minkar eina og eina hálva milliard, so eru tveir mátar at rætta upp, um vit skulu hava sama livistøði. Antin mugu vit spara eina og eina hálva milliard, ella skulu vit forvinna eina og eina hálva milliard.

Vit siga at vit skulu hava eina skiftistíð, sum hóskandi kundi verið uppá tildømis 20 ár. Men eg ivist í, um tað er so lætt.

Hettar vita allir Føroyingar væl, at soleiðis hongur tað saman. Tað er einki hokus pokus við tølum, líkamikið um tú setir útrokningar upp í stabbamyndum, ella tú brúkar fínar Power Point telduskipanir til framløgu.

Samstarv er ikki gáva
Eg haldi persónliga ikki, at tað sum vit fáa úr Danmark er ein gáva til okkara. Tað er ein forrætning, har báðir partar njóta.

Eg haldi nemliga ikki at vit eru í Danska kongaríkinum, tí danir eru so fittir ella hava blá eygu, og eg haldi heldur ikki at Danmark eru í ríkisfelagskapi við okkum, tí vit eru so fitt.



Eg meini at Samstarv ella Samband tænir okkum best, í menningini av okkara fólki bæði nú og framyvir.

**Føroyingar koyrdu landið á heysin**
Annars haldi eg at tað vóru vit Føroyingar, sum koyrdu landið á heysin, og at bankabjargingin var besti handil, sum vit nakrantíð hava gjørt og koma at gerða.

Eg meti okkum at hava fulla ábyrgd av landinum, um vit eru innanfyri ella uttan fyri ríkisfelagsskapin, og mítt allarstørsta ynskji skal verða, at tey veiku og gomlu skulu hava tað gott, bæði áðrenn og aftaná møguligar broytingarnar, í okkara ríkisrættarligu viðurskiftum.

**Kaj Leo Johannesen**
**Sambandsflokkurin**



# Sýna fram í Smiðjuni

*Teir tríggir listamenninir Ólavur á Váli, Sámal Toftanes og Eli Smith hav framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í dag og í morgin*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í gjár lat upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Tað eru teir tríggir Eli Smith, Ólavur á Váli og Eli Smith, sum sýna fram.

Framsýningin er bert opin um vikuskftið og tað vil siga, at hon er opin seinnapartin í dag og í morgin afturat.

Opið er frá kl. 15 til 20.



# Oljuleiting undir Føroyum og møgulig føroysk úrtøka

*Herfyri samtykti løgtingið endaliga seinasta partin av tí lógarverki, ið er karmurin um eina komandi oljuleiting við Føroyar. Sum tað seinasta av lógaruppskotunum samtykti løgtingið uppskot til broytingar í kolvetnisskattalógini, tann parturin, sum snýr seg um serskatt.*

JAN MÜLLER

Fyrsta útbjóðingarumfar til oljuleiting er tískil nú um at byrja, og skjøtil verður skjótt settur á oljuleiting á føroyskum øki. Oljufeløgini hava bíðað leingi, og hava verið tolin, meðan føroyingar hava fyrireikað seg, men vit mugu ikki gloyma, at ein høvuðsorsøkin til, at alt hetta hevur tikið tíð eru tær samráðingar, sum hava verið um markið millum Føroyar og Bretland.

Seinasti parturin av skattapakkanum - lógaruppskotið um serligan skatt á oljuframleiðslu - var einmælt samtyktur á tingi og nú henda lóg verður kunngjørd, er samlaða skattatrýstið á oljuframleiðslu kent. Í hesum sambandi hevur Sosialurin vent sær til Fíggjarmálastýrið, sum saman við Oljumálastýrinum hevur staðið fyri at evna til skattatreytirnar, sum oljufeløgini skulu undir. Regin Hammer, fulltrúi og oljubúskaparfrøðingur vísir á, at markskatturin (marginalskatturin) verður hesin:

sí talvu

Leggið tó til merkis, at serskatturin hækkar í stigum, alt eftir hvussu stóran vinning tann ávísa oljuleiðin kastar av sær. Tey 57,1% er so tað hægsta skattaprosentið, ið ein oljuleið kann koma at gjalda við uppskotnu skattaskipanini. Myndin niðanfyri vísir hvussu markskattatrýstið broytist, alt eftir hvussu stóran vinning oljuleiðin kastar av sær.

sí talvu

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um serskatt eru nakrar útrokningar av møguligum skattainntøkum gjørdar. Útrokningarnar eru gjørdar út frá einari oljuleið á stødd við Foinaven oljuleiðina, sum liggur í Hetlandsrennuni, bretsku megin markið. Hendan leið er 250 mió. føt til støddar. Framleiðslu-, og kostnaðarprofilur eru gjørdir út frá upplýsingum frá viðurkendu bretsku ráðgevarafyritøkuni Wood Makkenzie. Fíggjarmálastýrið vísir á, at útrokningarnar í viðmerkingunum til lógaruppskotið eru har, fyrst og fremst til tess at vegleiða hvussu ymisku skattirnir verða roknaðir, ikki til tess at vísa á hvussu stórar skattainntøkurnar kunnu verða. Tó hava nógvar gitingar verið seinastu árini um, hvussu nógv ein møgulig oljuvinna kann geva føroyska landskassanum. Omanfyri nevndu útrokningar vísa, at við einum oljuprísi uppá $17/fat, so kann árliga inntøkan til landskassan koma upp á uml. 800 mió. kr. um árið av einari leið. Um nútíðarvirðið av skattainntøkunum frá slíkari oljuleið undir givnu treytunum verður býtt við framleiðandi árunum, so sæst at ein slík leið kann geva í miðal 141 mió. kr. av sær um árið í nútíðarvirði tey 16 árini hon framleiðir.

Um farið verður víðari við hesum, so kundu spekulativar samanteljingar verið gjørdar. T.d. at tað tekur einar 6 keldur av hesi stødd við líknandi oljuprísum til, at Føroyar kunnu hava eins stóra árliga inntøku av olju sum av ríkisstuðlinum úr Danmark. Um so funnu keldurnar eru størri enn tey 250 mió. føt sum dømið omanfyri er roknað við ella um oljuprísurin er hægri, so kann úrtøkan til føroyska landskassan enntá vera størri enn upphæddin, ið nú verður veitt sum ríkisstuðul.

Fíggjarmálastýrið leggur tó stóran dent á, at slíkar útrokningar mugu takast við sera stórum fyrivarni, og kunnu bert í besta føri vera vegleiðandi (og í versta føri villeiðandi). T.d. er ikki greitt, um kostnaðirnir, sum roknað hevur verið við, eru rættir, tí ongin hevur fyrr roynt at leita eftir, og framleitt olju á føroyskum øki fyrr. Sum flestu kunnugt liggur eitt basalt-lag omaná størsta partinum av føroyska landgrunninum, og hetta kann hava stóra ávirkan á kostnaðin at bora oljubrunnar. Harumframt er stór óvissa um, hvussu nógv oljufeløg fara at søkja um loyvi at leita eftir olju í fyrsta útbjóðingarumfari.



*Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjamálum fekk flestu av sínum kolvetnisskattalógaruppskotum óskerd gjøgnum tingið. Við teimum er so støðið lagt undir skatting av komandi oljuinntøkunum. Sum partur av fyrireikingunum til skatting av oljuvinnu var landsstýrismaðurin m.a. í Alaska fyri at kunna seg við skattaviðurskifti, oljugrunnar ol. Á myndini vitjar landsstýrismaðurin*

Eisini er óvissa um, hvussu nógvan pening feløgini fara at brúka at leita fyri í føroyskum øki. Hetta eru viðurskifti, ið hava alstóran týdning fyri, hvussu stór úrtøka landsins verður av einari møguligari oljuvinnu.

Tá fyrsta viðgerð av lógaruppskotinum um serskatt var í tinginum, varð spurt eftir einari meting av úrtøkuni til føroyska landskassan av einari oljuvinnu, og ikki bert av skattainntøkum, men eisini av tí avleidda virkseminum. Útrokningarnar hjá Fíggjarmálastýrinum taka ikki hædd fyri møguligum avleiddum virksemi, m.a. av tí orsøk at hetta verður mett sum ein ógjørlig uppgáva tí ikki ber til at siga hvussu nógvir brunnar verða boraðir, hvussu nógv avleitt virksemi verður, hvussu nógv av hesum virksemi verður í Føroyum: Av hesum orsøkum ber heldur ikki til at siga hvørjir 'ringvirkningarnir' verða.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoinntøka: ........................................ | 100,0 | | |
| Framlei?slugjald (2%): ........................................ | 2,0 | | (0,02*100,0) |
| | 98,0 | | |
| Vanligur kolvetnisinntøkuskattur (27%):........................ | 26,5 | | (0,27*98,0) |
| | 71,5 | | |
| Serligur kolvetnisinntøkuskattur (40%): ........................ | 28,6 | | (0,40*71,5) |
| Vinningur aftaná serskatt (á hægsta stigi): ........................ | 42,9 | | |
| Markskattur: ........................................ | 57,1 | % | (100,0-42,9) |




